## VIÐMERKINGAR

# Løgið við drotningini

**Finnur Helmsdal**



Danmarkar drotning er fyri nógvar føroyingar ímyndin av tí góða og fólkaliga idyllinum. Nú er eingin kongur, men hava kongur og drotning annars staðið sum landsfaðir og -móður. Eingin ivi skal valda um, at sølan av donskum vikuskiftisbløðum upprunaliga er komin av, at kongafamiljan hevur verið so stórur partur av tilfarinum. Nú eru bert ávís av hesum vikubløðunum, sum dyrka tey kongaligu.

Lesa vit í Danmarks Riges grundlov, síggja vit, at kongur ella drotningin, um eingin kongur er, hevur sín avgjørda status í donskum stjørnarviðurskiftum. Grein 3 sigur, at kongur (drotningin) og fólkating hava lóggevandi valdið í felag. Kongur hevur útinnandi valdið. Í grein 13 stendur, at kongur hevur ikki ábyrgd av gerðum sínum, og at hann er friðhalgaður. Grein 14 sigur, at kongur tilnevnir og sigur úr starvi statsministaran og ministararnar. Lógir hava ikki gildi uttan undirskrift kongsins.

Vit vita tó, at alt hetta, sum grundlógin sigur um vald og møguleikar kongs, bert er proforma í veruleikanum. Grein 2 sigur, at stýrisháttur Danmarkar er avmarkað kongsvald. Í veruleikanum er kongsvaldið bert ein institutión, sum púrt einki veruligt vald hevur, men sum hevur ein ella annan savnandi og umboðandi týdning fyri Danmark. At kongshúsið hevur sína ávirkan á Føroyar og føroyingar síggja vit ikki bara gjøgnum søluna av donskum vikuskiftisbløðum, vit síggja tað kanska allarbest, tá tey vitja land okkara.

Tað er ílagi, at føroyingar ganga runt og hava limir í danska kongshúsinum sum okkurt slag av fyrimyndum. Um tey spegla sær í Mary ella Britney kann vera tað sama.

Men kongshúsið hevur sum sagt púrt einki stjórnarligt ella politiskt vald. Í veruleikanum halda skiftandi danskar stjórnir høvdið á kongshúsinum undir vatninum við makt. Sambært donskum politikarum skulu tey kongaligu ikki ikki siga ella gera nakað sum helst, ið ber minsta brá av politiskari tilgongd ella hugsan. Tey kongaligu verða sligin hart á fingrarnar, um nakar teirra bert ger eitt lítið "politiskt" vims við halapartinum. Og um drotningin skuldi funnið upp á at lagt seg út í handfaringina hjá stjórnini av heilsuøkinum ella útlendingaøkinum, ja, so hevði kongshúsið beinan vegin verið á markinum til at verða avtikið.

Politiska valdið hevur hin vegin tiskilað sær rætt til at nýta kongshúsið "politiskt". Feskasta dømi um hetta er røðan, sum drotningin helt í Norðurlandahúsinum í summar. Politiska valdið í Danmark tilskilar sær rætt til at nýta kongshúsið til at fremja politisk áhugamál hjá ávísum, og til at leggja fótonglar fyri politiskum mótstøðumonnum. Og kongshúsið kann í hesum sambandi ikki gera annað, enn stjórnin áleggur teimum.

### Kongshús uttan meining

Vit hava tí í dag eina drotning, sum á ongan hátt livir upp til heitið. Ein drotning er sambært orðabókum og øðrum ein regentur. Ein regentur er ríkisstjórnarin, sum er ovasti stjórnarligi og politiski myndugleikin. Orðini kongur og drotning eru eisini nýtt í nógvum øðrum samanhangum. T.d. í talvi í vakurleikakappingum og sum hugtøk. Altíð hugsað sum tann ella tey, sum eru ovast, sum hava valdið o.s.fr.

Vit standa í dag við eini drotning, sum hvørki hevur stjórnarligt ella politiskt vald. Vit hava eina drotning, sum liggur í lógvanum á stjórnini, og kann stjórnin, nær tað skal vera, gloppa lógvarnar, og kongshúsið er farið í søguna.

### Avtaka kongshúsið

Tankin um at avtaka kongshúsið er ikki nýggjur, og eru tað alt fleiri, sum taka undir við honum. Nú hevur hetta mál ikki fingið almenna umrøðu í Føroyum, m.a tí so nógvir føroyingar hava verið treyta leys í síni kongstrúgv. Og kanska eisini tí, at eingin rættiliga hevur hugsað um kongshúsið sum annað enn ein óskyldug glæstrimynd. Frederik var populerur, síðan bleiv Margretha tann fyrikomandi, fólksliga og kreativa drotningin. Vakra Anna Maria við sínum grisku tragediu. Og so fríska og aktiva eysturlendska nosið Alexandra, sum tó vísti seg at vera so hyperaktiv, at prinsurin ikki rættiliga kláraði at fylgja við. Men so trein Mary á pall, og hon er jú ímyndin, sum megnar at metta allar tørvir, sum trúføstu lesararnir av vikuskiftisbløðunum hava. Hon er flott og vøkur, sjarmerandi, fyrikomandi, skilagóð og so hómast beinið í nøsini. Glæsiliga geisling hennara kávar út yvir fríggjaríið hjá Alex, pínliga Andrikkin, stórroykjandi og alt meira diffusu drotningina og so ein nokk so óbúnað og ikki sørt fjákuta krúnprins. Mary er sostatt respiratorin hjá danska kongshúsinum, spurningurin er bara, hvussu leingi hon megnar og orkar tann leiklutin. Danska kongshúsið er farið í líkjast øðrum slíkum. Myndin av teimum kongaligu gerst alt meira átøk upppumpaðu og ólekru reality sendingunum, sum eitt ótal av sjónvarpsrøðum senda dagliga.

Vit kunnu tí staðfesta, at danska kongshúsið er vorið ein institutión, sum bert er til fyri sína egnu skyld. Kongshúsið hevur onga meining longur. Monarkurin hevur púrt einki vald og virkar nú mest sum búktalari fyri stjórnina. Leiklutin sum savnandi og moralsk fyrimynd megna tey kongaligu á ongan hátt longur. Og tí er spurningurin, um vit yvir høvur skulu hava nakað kongshús, meira aktuellur enn nakrantíð.

Sjálvur haldi eg, at vit eiga at avtaka kongshúsið sum skjótast. Ikki bara tí Fogh nýtir drotningina sum politiskt sendiboð, men tí eg ikki dugi at síggja nakra meining í at hava ein monark, sum ikki hevur ein einasta myndugleika, sum ein monarkur eigur at hava. Hugtakið kongur og kongafamilja er einki veruligt hugtak longur, at meta sum fossilt bringuprýði. Eg havi als ongan hug at vera í kongsfelagsskapi við Danmark, og slettis ikki, tá kongurin bara er ein kransakakufigurur. Nú fara danir neyvan at lurta eftir okkum í spurninginum um fram tíðina hjá kongshúsinum. Men vit kunnu so sjálvi taka stig til, at vit ikki ynskja at vera partur av proforma fyritøkuni Det Kongelige Danmarks Rige.

# Skipað órøkt

**Dánjal Jákup Meinertsson**

The continuing story of Bungalow Bill

(Lennon/McCartney útsetingin av glæntrileikinum um ósetta sløkkiliðsleiðarin)

Í Sosialinum, vikuskiftið 1 - 2 okt., er ein grein um brandbilar hjá Klaksvíkar Sløkkiliði, sum lógu í streymloysi. Fyri nøkur er hetta áhugaverdur lesnaður, og fyri onnur er hetta skelkandi. Fyri mær er hetta, tíverri, hvørki skelkandi ella áhugavert. Tað er heldur ikki serliga skelkandi ella áhugavert, at leiðarin á sløkkiliðsstøðini, sum hóast alt er tann sum fær løn fyri viðlíkahaldið, roynir at turka sína ábyrgd uppá teir sløkkiliðsmenn, sum gera tað veruliga arbeiði á støðini. Tað er bara hansara vælkendi arbeiðsháttur. Hinvegin er tað rættuliga láturligt at síggja, at borgarstjórin skal "kanna málið til botns". Tað kundi, í hesum samanhangi, verið áhugavert at spurt um hann eisini skuldi kanna málið til botns, tá lensipumpan hjá Klaksvíkar Sløkkiliði fór í hundarnar av órøkt, og ein bátur sakk í Hvannasundi av somu orsøk. Eg havi javnan samskifti við fleiri av sløkkiliðsmonnunum og, havandi í huga hvussu álvarsliga teir taka sína uppgávu, má tað vera ómetaliga frustrerandi fyri teir at borgarstjórin soleiðis heldur teir fyri gjøldur. Tí søgan um brandstøðina er bæði long og ótýdlig. Spurningarnir vit eiga at seta okkum eru: Hvussu ber tað til at sløkkiliðsleiðarin, sum átti at verið útskiftur tá hann var 60, framvegis er leiðari nú 6 ár seinni? Hvussu ber tað til at býráðið, eftir fleiri royndum, enn ikki hevur sett ein nýggjan sløkkiliðsleiðara? Hvussu ber tað til at býráðið, nú undirsjóvartunnilin skjótt letur upp, framvegis letur fráfarandi sløkkiliðsleiðara luttaka í fyrireikandi arbeiðinum til tilbúgvingina har, og soleiðis frátekur einum komandi leiðara møguleikan fyri at kunnað og fyrireika seg til tær uppgávur, sum undirsjóvartunnilin hevur við sær?

Um vit samanbera greinina í Sosialinum 1-2 oktober, har varaleiðarin á brandstøðini hevur úttala seg til blaðið, við greinina hósdagin 29 september, har leiðarin úttalar seg, síggja vit at stórt ósamsvar er millum útsøgnirnar.

**1. Leiðarin:** Gott eftirlit er við útgerðini á støðini
**Varaleiðarin:** Onki skipa eftirlit er
**2. Leiðarin:** Ein bilur startaði ikki
**Varaleiðarin:** Tveir bilar startaðu ikki
**3. Leiðarin:** Bert ein manningarbilur uttan sløkkiútgerð
**Varaleiðarin:** Ein stórur sløkkibilur við allari sløkkiútgerð, roykkavaraútgerð, tveimum tonsum av vatni og klippiútgerð, og ein manningarbilur við kavaraútgerð

Annar av hesum báðum monnunum sigur ósatt fyri okkum. Hvat er satt og hvat er ósatt skal helst "kannast til botns". Seinna greinin leggur upp til, at leiðarin á brandstøðini í Klaksvík ikki er eftirfarandi, og at hann bagatelliserar trygdina og tilbúgvingina.

Og júst bagatellisering av trygd og tilbúgving er eitt av fremstu eyðkennunum hjá sløkkiliðsleiðaranum, í hinum starvinum hann hevur hjá Klaksvíkar Kommunu. Hann er nevniliga eisini leiðari í Klaksvíkar Svimjihøll, sum Klaksvíkar Kommuna eigur. Í hesum starvi hevur hann, til fulnar, brúkt møguleikan til at seta skyldfólk í starv, heldur enn fólk við lívbjargarafø rleika. Eisini er varaleiðari við framíhjárætti til leiðarastarvið settur eftir góðu gomlu familjukriteriunum. Og hóast fólk eru sett í starv við kravi um, at tey hava lívbjargarafø rleika, er onki gjørt fyri at halda henda førleika viðlíka. Starvsfólk, sum av sínum eintingum hava roynt at uppihalda førleikanum, hava fingið skamm og last afturfyri. Og onki er gjørt fyri, at frítíðaravloysarar taka lívbjargaraprógv, hóast lívbjargararoyndin kann takast uppá 1_ tíma. Hetta er hugburðurin til trygd og tilbúgving hjá verandi leiðara í Klaksvíkar Svimjihøll og so sanniliga eisini hjá Klaksvíkar Sløkkiliði. Tað syrgiligt er bara, at hetta er ikki neyðugt hjá borgarstjóranum, Steinbjørn O. Jacobsen, at "kanna til botns". Hann er væl kunnaður um viðuskiftini. Eisini skrivliga. Men hann hevur valt, sera aktivt, at verja starvsháttin og laka hugburðin hjá sløkkiliðs- og svimjihallarleiðaranum. Klaksvíkingar fara helst at gera sær sínar tankar um hví.